Ítróttar
Sosialurin
Nr. 105 • fríggjadagur • 2. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ósemja í Kappingarnevndini

**Talan var ikki um eina samda Kappingarnevnd, sum mikukvøldið tók avgerð um, at HB enn einaferð skuldi sendast úr steypakappingini**

**HB-MÁLIÐ**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Høgni Stórustovu, formaður í Kappingarnevndini vísti í sínum tilmæli á, at hann ikki helt vantandi spæliloyvið hjá Páll M. Joensen vera nóg góða orsøk til, at HB skuldi tapa dystin.

### Fráboðanarskyldan

Í grundgevingum sínum førir formaðurin millum annað fram, at málið er sjálvstøðugt mál, og at tað tí ikki ber til at viðgera hetta við støði í málum hjá KÍ í fjør.

Hartil sigur Høgni, at tað ikki fyriliggur nakað formligt krav um, hvussu fráboðanarskyldan hjá feløgunum mótvegis FSF viðvíkjandi spælarahópinum skal umsitast. FSF-reglurnar staðfesta her, at Feløgini hava ábyrgdina av at fráboða allar sínar spælarar til FSF innan 1. mars í kappingarárinum, men einki verður sagt um, hvussu hetta skal gerast. Tí metir Høgni í Stórustovu, at HB hevur lokið sína fráboðanarskyldu, tá felagið læt FSF spælarasáttmálan til góðkenningar. Líkamikið, um spæliloyvið var við í tilfarinum, sum FSF tá fekk frá HB.

### Strong tulking

Meirilutin í Kappingarnevndini – Rúni Heinesen og Karl Vidtfeldt – heldur hinvegin fast um tær tulkingar, ið áður eru gjørdar viðvíkjandi vantandi spæliloyvum.

Vísandi til grein 14 og 15 verður staðfest, at spælari er at rokna sum lógligur, tá hesin hevur fingið útskrivað loyvisbræv. Samstundis er tulkingin av hesum, at uttan loyvisbrævið er spælarin at rokna sum ólógligur, og at felagið tí ikki kann gera nýtslu av hesum.

Tað er annars vert at bíta merki í, at ein av limunum í Kappingarnevndini, Rúni Heinesen, nú hevur eina aðra fatan av hugtakinum um spæliloyvi.



*Páll Mohr Joensen hevur spælt væl fyri HB í ár, men spælarin hevur verið í andglettinum seinastu vikurnar, tí spæliloyvi hjá honum var ikki í lagi, tá ið hann spældi fyri HB í steypadysti ímóti VB/Sumba*

# Rúni broytti støðu

**Rúni Heinesen var upprunaliga ímóti, at KÍ og B36 vórðu dømd at tapa dystir sínar í fjør. Hann skifti tó støðu, tá málið varð tikið upp í aðalnevndini, og síðani hevur hansara fatan av reglunum um spæliloyvi verið greið**

**HB-MÁLIÐ**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur skapt nakað av øsing kring málið um Páll M. Joensen, at ein av limunnum í Kappingarnevndini ikki hevur somu støðu nú, sum hann hevði fyri góðum ári síðani.

Í viðgerðini hjá Kappingarnevndini av málinum um dystirnar hjá KÍ og B36 í steypakappingini í fjør framgongur, at Rúni Heinesen og Bjarki Mohr vóru ímóti, at KÍ og B36 vórðu dømd at tapa sínar dystir, meðan triði limurin í nevndini, Karl Vidtfeldt, metti at feløgdini áttu at tapa dystirnar. Kappingarnevndin metti tó, at málið hevði somikið prinsipiellan týdning, at hetta skuldi leggjast fyri aðalnevndina.

Mikukvøldið hevði Rúni Heinesen tó eina aðra støðu í málinum, og saman við Karl Vidtfeldt átti hann meirilutaavgerðina hjá nevndini.

### Broytti fatan í fjør

Sjálvur heldur Rúni Heinesen tó ikki, at tað er nakað merkisvert í broyttu støðutakanini hjá sær.

– Tá málið var til viðgerðar í fjør, var kappingarnevndin samd um, at feløgini høvdu nýtt ólógligar spælarar. Hinvegin var eg ikki samdur í revsingini, tá vit viðgjørdu málið á fundi í Kappingarnevndini.

– Tá málið so varð lagt fyri aðalnevndina, høvdu vit eisini biðið um eitt løgfrøðiligt notat um málið, og tað var hetta, sum gjørdi, at eg broytti støðu í málinum. Tú kanst kanska siga, at eg tá kom eftir, hvussu strangt reglan um spæliloyvi verður tulkað, og tá endaligi úrskurðurin varð gjørdur, var eg samdur í hesum. Tað var ein úrskurður, sum varð staðfestur av Dómsnevndini, og sjálvur havi eisini havt somu støðu síðani, staðfestir Rúni Heinesen.

**STUTT SAGT**

## Ivi um HB-málverjan

Størsta ivamálið hjá HB undan dystinum móti NSÍ tykist vera Bárður Johannesen, sum hevur trupulleikar við skaða í lærkrikanum. Eisini Jákup á Borg hevur trupulleikar við lærkrikanum, og eitt nú á Toftum valdi venjarin at spara landsliðsspælaran. Roknað verður tó við, at hann verður við á liðnum, sum mánadagin fer á vøllin.

Hjá NSÍ er Helgi L. Petersen uttan iva týdningarmesta fráveran. Sterki offensiv-spælarin var annars við at koma fyri seg eftir skaða, men móti ÍF fekk hann bara einar tveir minuttir, áðrenn hann mátti hjálpast av vøllinum. Tað gongur nakað av tíð, áðrenn hann aftur er tøkur aftur. Hartil er Sjúrður Jacobsen aftur farin undir venjingar eftir drúgvan skaða, meðan Johan Troest Davidsen nú fer at royna seg hjá Skála.

**-mørk**

## KÍ vil vinna

KÍ-hópurin fer suður til Vágs longu leygardagin, og sum skilst, so eru allir mans tøkir. Sinisa Jovanovic hevði leikbann móti B36, men hann er við aftur. Tað sama er Iulian Florescu, sum hevur verið úti við skaða, og Paul Clapson, sum tó var við leygardagin, er nú heilt komin seg eftir skurðviðgerðina, sum hann hevur verið undir. Ætlanin var, at Christian Lundberg skuldi koma til Klaksvíkar undan vikuskiftinum, og so fæst at síggja, um hann verður við í Vági. Ivasamt tykist vera, um Høgni Madsen, sum hevur ligið sjúkur í vikuni, kann spæla, men roknað verður við, at hann er partur av hópinum, sum skal til Vágs.

Í Vági stendur hinvegin ikki eins væl til við fólki. Serstakliga er tað ein smeitur, at bæði Evrard Ble og Christan Solbaerg hava drigist við skaða. Hartil hevur Hallur Dam Joensen – sum annars hevur staðið seg heilt væl – eisini fingið skaða í lærkrikan, so tað er av álvara farið at tynnast við fólki hjá VB/Sumba.

**-mørk**